FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Tórshavn, 9. november 2020
J.nr.: 20/00458

# Avtala millum Fíggjarmálaráðið og Runavíkar kommunu um nýggjan Fjøruveg í Runavík

Avtala um nýggjan Fjøruveg fevnir um eina samlaða og samanhangandi vegaloysn frá rundkoyringini á Rókini (A) inn á Glyvraveg á Glyvrum (D), sum víst á hjálagda korti. Verkætlanin verður væntandi liðug í 2024.

Lýsing av verkætlanini/vegaføringini:

A: Vegur frá rundkoyringini á Rókini fer at liggja aftan fyri vinnubygningarnar á Rókahavnini. Vegurin verður lagdur í verandi lendi. Íbindingar verða gjørdar í vegin frá Rókahavnini og Rókavegi.

B: Betongtunnil verður gjørdur framvið Rókavegi og undir Løkin og Heiðaveg, og kemur upp við Gulasteinsveg.

C: Vegur fram við havnarlagnum í Runavík. Vegurin fylgir Gulasteinsvegi/Fjarðarvegi fram við fjøruni og uppfyllingini til ætlaða havnarøkið við bryggjuna undir Høgabóli. Vegurin verður bundin í Bakkaveg inni á Glyvrum.

D: Íbindingin í Glyvraveg verður gjørd soleiðis, at Fjøruvegur (Bakkavegur) verður høvuðsvegur í mun til Glyvraveg.

**Kommunalur vegur**: Alt vegastrekkið verður kommunalur vegur. Tó verða íbindingarnar í Rókaveg og Glyvraveg landsvegur.

**Kostnaður:** Runavíkar kommuna ber kostnaðin av verkætlanini við stuðli frá landinum. Stuðulin frá landinum til verkætlanina verður tilsamans 55 mió. kr., sum ásett verður í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár. Í 2020 er játtanin 13,8 mió. kr. Í 2021 verða 10 mió. kr. játtaðar. Eftir ætlan verða 10 mió. kr. játtaðar í 2022, 12 mió. kr. í 2023 og 9,2 mió. kr. í 2024.

Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Treytir:**

- Stuðulin fyri 2021 – 2024 er treytaður av, at arbeiðið við Fjøruvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Fjøruvegurin skal lúka galdandi krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá Eysturoyartunlinum, uttan so at vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar sum ferðslubungur og tílíkt, soleiðis at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í Fjøruvegin kunnu bert gerast til ferðsluvegir, ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein ferðsluveg, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast og ferðslan tarnast minst møguligt.
- Ùtgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík er farin úr gildi.
- Henda avtala er galdandi inntil 31. desember 2045. Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikkulin tá Fjøruvegurin er liðugur bygdur.

Avtalan er treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskot til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan Fjøruveg í Runavík, og at Runavíkar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og í hesi avtalu.

Tórshavn, 9. november 2020

| | |
|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | Runavíkar kommuna |
| Jørgen Niclasen | Tórbjørn Jacobsen |


A
B
C
D

**Betongtunnil framvið Rókavegi og undir Løkin og Heiðaveg**

